LM-004/2026

# Almanna- og bústaðamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. august 2026 |
| Mál nr.: | 26/14801 |
| Málsviðgjørt: | ARØ/TS |
| Ummælistíð: | 1. juli 2026 - 10. juli 2026 |
| Eftirkannað: | 16. juli 2026 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina**
(Hækka upphæddina og leingja gildistíðina)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 1. mai 2024 um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 2 verður “11 mió. kr.” broytt til: “13,5 mió. kr.”.

**2.** Í § 2 verður “1. januar 2027” broytt til: “1. januar 2028”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

TAKS, sum mennir nýggju kt-skipanina til barsilsskipanina, hevur boðað Almanna- og bústaðamálaráðnum frá, at tað verður neyðugt at tillaga fíggjar- og tíðarætlanina sambært verklagslógini, løgtingslóg nr. 28 frá 1. mai 2024 um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina, fyri at fáa tær talgildu loysnirnar til borgarar og arbeiðsgevarar lidnar. Tørvur er tí á at hækka upphæddina, sum útreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi kunnu vera, og at leingja gildistíðina á verklagslógini.

Innanhýsis umsitingarligi parturin av nýggju kt-skipanini er longu tikin í nýtslu hjá TAKS. Tær 2,5 mió. kr., sum nú verður skotið upp at hækka fíggjarligu heimildina við, eru ætlaðar til at fáa talgildu loysnirnar fyri borgarar og arbeiðsgevarar lidnar, soleiðis at umsóknir og samskifti kunnu fara fram talgilt.

Hetta er í samsvari við upprunaliga endamálið við verklagslógini, og verður mett at lætta um umsitingina hjá borgarum, arbeiðsgevarum og tí almenna, samstundis sum málsviðgerðin verður meira effektiv og smidlig.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg nr. 28 frá 1. mai 2024 um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina kom í gildi 2. mai 2024 og fer úr gildi 1. januar 2027. Løgtingslógin heimilar landsstýrisfólkinum at menna barsilsskipanini eina nýggja kt-skipan, og útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 11. mió. kr.

Endamálið við verklangslógini var, "*at útvega materiella heimild til at menna eina nýggja og meira talgilda kt-skipan at umsita barsilsútgjaldið við. Nýggja kt-skipanin verður meira brúkaravinarlig hjá øllum pørtum, og borgarin fær eina betri tænastu, samstundis sum kt-skipanin verður lættari at umsita. Nýggja kt-skipanin verður løtt at tillaga til væntaðar framtíðarbroytingar á barsilsøkinum. Umframt hetta fær barsilsskipanin betri atgongd at dátum, so at til ber at gera betri og bíligari hagtalsgreiningar.*"

Lógaruppskotið sæst her: LM-063/2023: Uppskot til løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina.

TAKS, sum mennir nýggju kt-skipanina fyri landsstýriskvinnuna, hevur boðað frá, at tað ikki ber til at fáa nýggju kt-skipanina lidna og tikna í nýtslu innan fyri fíggjarætlanina og tíðarætlanina sambært løgtingslógini orsakað av teimum krøvum og tørvum, sum eru komin fram undir menningartilgongdini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka upphæddina, sum útreiðslurnar til verkætlanina skulu haldast innanfyri, og at leingja tíðarskeiðið, sum heimild er at brúka peningin í. Á henda hátt fer at bera til hjá TAKS at arbeiða víðari við at menna kt-skipanina uttan steðg. Tað er týdningarmikið, at arbeiðið heldur fram uttan avbrot, tí at annars fer tað at hava meirútreiðslur við sær orsakað av uppstartskostnaði og príshækkingum, umframt at tað fer at hava munandi seinkingar við sær.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Skotið verður upp at hækka upphæddina í verklagslógini úr 11 mió. kr. upp í 13,5 mió. kr. og at leingja gildistíðina av verklagslógini við einum ári, soleiðis at TAKS fær ment nýggju kt-skipanina til barsilsskipanina lidna.

TAKS hevur, saman við tænastuveitarunum, mett, at tað fer at kosta umleið 2,2 mió. kr. meira at fáa nýggju kt-skipanina lidna. Henda metingin byggir á ta loysn, sum TAKS hevur mælt til.

Skotið verður tó upp at hækka verklagsjáttanina við 2,5 mió. kr. Av hesum eru 2,2 mió. kr. ætlaðar til sjálva menningina, meðan 0,3 mió. kr. eru settar av til at taka hædd fyri óvissu og møguligum óvæntaðum meirkostnaði.

Verður borið skjótt at við at fáa øktu fíggingina til verkætlanina, fer at bera til hjá TAKS at halda fram við arbeiðinum uttan steðg. TAKS metir, at arbeiðið kann gerast liðugt, og at kt-skipanin kann takast í nýtslu 1. apríl 2027. Sum er, hevur TAKS fígging til at halda fram við arbeiðinum til umleið 15. august 2026.

Verður hinvegin ikki borið skjótt at, verður neyðugt hjá TAKS at flyta arbeiðsorkuna yvir á aðrar verkætlanir. Fæst peningur til vegar seinni, fer at bera til hjá TAKS at taka arbeiðið upp aftur síðst í 2027. Mett verður, at ein útseting fer at hava við sær eyka útreiðslur á umleið 250–400 tkr. orsakað av væntaðum príshækkingum hjá tænastuveitarum og kostnaðinum av at seta arbeiðið í gongd aftur. Harumframt kann væntast, at kt-skipanin ikki verður klár fyrr enn á vári í 2028.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið, sum er gjørt saman við TAKS, hevur ligið á heimasíðuna hjá Almanna- og bústaðamálaráðnum og varð sent til ummælis hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Ummælistíðin var frá 1. juli 2026 til og við 10. juli 2026.

Tá ið ummælisfreistin var úti, vóru viðmerkingar komnar frá Heilsuhjálparafelag Føroya, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, Mentamálaráðnum, Vinnuhúsinum og Vinnumálaráðnum.

**Heilsuhjálparafelag Føroya** hevði ongar viðmerkingar til sjálvt uppskotið, men til arbeiðið at menna nýggja KT-skipan til barsilsskipanina. Sí fylgiskjal 2.

**Kommunala Arbeiðsgevarfelagið,** fylgiskjal 3, **Mentamálaráðið,** fylgiskjal 4 **Vinnuhúsið,** fylgiskjal 5 **og Vinnumálaráðið,** fylgiskjal 6, høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Barsilsgrunnurin ber kostnaðin av at menna nýggju kt-skipanina til barsilsskipanina.

Talan er um eina nýggja kt-skipan, sum loysir eina aðra kt-skipan av, og sum TAKS heldur við líka og umsitur. Rakstrarsparingar verða, tí málsviðgerðin verður meira effektiv. Sum frá líður, fer væntandi at bera til at effektivisera raksturin av barsilsskipanini upp aftur meira við nýggju kt-skipanini.

Sambært landsroknskapinum fyri 2025 hevði Barsilsgrunnurin inntøkur upp á 227,6 mió. kr. og útreiðslur upp á 211,2 mió. kr., svarandi til eitt avlop á 16,5 mió. kr. Ogn grunsins var 101,6 mió. kr. við árslok 2025.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur gagnligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, við tað at umsitingin av barsilsútgjaldinum verður smidligari við nýggju kt-skipanini.

Ilt er at meta um, hvørjar sparingar ein nýggj kt-skipan kann væntast at hava við sær. Men við tí í huga, at einar 9.000 handfaringar eru í kt-skipanini um árið, samstundis sum skarin, sum er knýttur at kt-skipanini, støðugt skiftir, verða rakstrarsparingar á umsitingarøkinum, tá ið farið verður frá verandi kt-skipan við fysiskum skjølum til eina smidligari talgilda kt-skipan, har til ber at rita inn við sjálvgreiðslu.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur gagnligar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, tí tað verður m.a. lættari at vátta barsilsfráveru og søkja um endurrindan. Vinnan kann tí vænta minni umsiting í sambandi við barsil frameftir.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur gagnligar avleiðingar fyri løntakarar, sum eru knýttir at barsilsskipanini. Kt-skipanin verður meira brúkaravinarlig, og løntakarin fær eina betri tænastu.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er viðkomandi fyri barsilsskipanina. Uppskotið er ikki í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, tí uppskotið hevur onga broyting við sær við atliti at sambandinum millum barsilslógina og sáttmálan um almannatrygd.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Uppskotið er ikki í ósamsvari við hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan og sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Viðvíkjandi evropeiska mannarættindasáttmálanum kann upplýsast, at nýggja kt-skipanin fer at lætta um privat- og familjulívið, við tað at løntakarar fáa eina betri tænastu við lagaligari mannagongdum og eini smidligari kt-skipan, sum ger tað lættari at gera broytingar undir barsilstíðini.

**2.9. Markaforðingar og flytføri**

Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**

Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Uppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at nýta upp í 2,5 mió. kr. afturat verandi 11 mió kr. til at menna eina nýggja kt-skipan til barsilsútgjald. Barsilsgrunnurin ber kostnaðin.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn. Við samtykki frá einum løntakara kann kt-skipanin sjálvvirkandi heinta tær privatu upplýsingarnar um løntakaran, sum krevjast til at viðgera eina umsókn um barsilsútgjald. Kortini kann leggjast afturat, at talan er um upplýsingar, sum umsøkjarin í dag skal upplýsa í umsóknarskjalinum. Talan er ikki um, at myndugleikin fær atgongd at øðrum persónligum upplýsingum enn teimum, sum í dag verða brúktar til at viðgera eina umsókn um barsilsútgjald.

**2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?**

Lógaruppskotið snýr seg um at menna eina kt-skipan, sum m.a. skal viðgera persónsupplýsingar, men hetta lógaruppskotið snýr seg ikki um persónsupplýsingar.

**2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar, enn oman fyri tilskilað.

**2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
***§ 1, nr. 1***
Ásetingin hevur við sær, at útreiðslurnar til at menna nýggju kt-skipanina til barsilsskipanina í mesta lagi kunnu vera 13,5 mió. kr. í staðin fyri 11 mió. kr., sum er ásett í galdandi løgtingslóg. Tað hevur víst seg, at menningin av kt-skipanini ikki kann gerast innanfyri verandi verklagslóg, og tí er neyðugt at hækka upphæddina við 2,5 mió. kr. – úr 11 mió. kr. til 13,5 mió. kr. Broytingin hevur við sær, at kt-skipanin kann gerast liðug í mars 2027 og takast í nýtslu í apríl 2027.

***§ 1, nr. 2***
Ásetingin hevur við sær, at verklagslógin um at menna nýggja kt-skipan til barsilslógina verður longd við einum ári, frá 1. januar 2027 til 1. januar 2028. Orsøkin, til at tað er neyðugt at leingja gildistíðina, er, at kt-skipanin ikki verður liðug innan 1. januar 2027.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Almanna- og bústaðamálaráðið, 3. august 2026.

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Mentamálaráðnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Vinnumálaráðnum